


**HAMSKIFTIR**

*Sjáldan var vandin stórur frammfyri málunum báðum*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

*Mynd: Álvur Haraldsen, savnsmynd*

# Egil hugsar ikki um FM

*Egil á Bø, liðskipari hjá EB/Streymi, sigur, at sundalagsmenn skulu ikki hugsa um føroyameistaraheitið í løtuni.*

*– Vit mugu hava í huganum, at bara fimm av 27 landskappingardystum eru avgreiddir. Men tað eru longu seks stig upp til oddaliðini. Nú ræður um at vinna nakrar fótbóltsdystir, so vit ikki missa sambandið við oddan. Tað er okkara uppgáva í løtuni, sigur Egil á Bø.*

*EB/Streymur eru nú sættir í røðini við fimm stigum. Fríggjadagin vitja sundalagsmenn í Runavík.*

**» Vit eru framvegis ósigraðir, og HB er í oddinum. Tað stendur ikki illa til. Venjarin vil sjálvsagt hava sína ávirkan galdandi, og fleiri nýggj andlit eru í hópinum. Tað tekur tíð.**

VAGNUR MOHR MORTENSEN